# Ein prædika til allar føroyingar



*Tað verður presturin í Norðurstreymoy, Mogens Tilsted Christensen, sum fer at halda ólavsøkuprædikuna í ár. Hann leggur dent á, at tað verður ein prædika til allar føroyingar*

**Mogens Tilsted Christensen heldur ólavsøkugudstænastuna í ár. Hann sigur, at prædikan verður til allar føroyingar**

ÓLAVSØKU-PRÆDIKAN
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Tað verður Mogens Tilsted Christensen, prestur í Norðurstreymoy, sum fer at halda ólavsøkuprædikuna í ár.

– Eg haldi, at tað er ógvuliga spennandi og avbjóðandi at skula halda ólavsøkuprædikuna, sigur Mogens Tilsted Christensen.

Hann hevur verið prestur í Føroyum í eitt ár nú. Sjálvur sigur hann, at tað er ein stór æra at sleppa at halda gudstænastuna á tjóðarhátíð okkara.

### Til øll

– Prædikan verður til allar føroyingar. Løgtingið verður jú eisini sett á ólavsøku, so tað verður eisini okkurt við til tey, men fyrst og fremst verður tað til allar føroyingar, leggur presturin dent á, sum tó ikki vil avdúka ov nógv, áðrenn sjálva gudstænastuna.

Tað var longu í vár, hann fekk at vita, at tað gjørdist hann, ið skuldi halda gudstænastuna. Og líka síðani hevur hann gingið og hugsað eitt sindur um, hvat ólavsøkuprædikan skal snúgva seg um.

– Eg var við til ólavsøkugudstænastuna í fjør, og eg haldi, at føroyingar bakka ólavsøkuna ótrúliga væl upp. Ólavsøkan er ein kensluborin og ótrúliga vakur siður, heldur Mogens Tilsted Christensen.

Dagins tekst sjálvan ólavsøkudag eigur hann eisini at halda seg til, og tað er teksturin um hveitikornið, sum skal leggjast í jørðina at doyggja, áðrenn tað kann vaksa aftur og gerast til ein aks við nógvum kornum.

Mogens Tilsted Christensen er upprunaliga ættaður úr Viborg, Danmark, har hann í fleiri ár starvaðist sum ognarseljari. Hann fór síðani undir prestaútbúgving, og sum 58 ára gamal fekk hann sítt fyrsta embæti í Føroyum. Tann 10. juli í ár fylti hann 60 ár, og hann sær fram til 10 góð ár í prestayrkinum. Sambært honum sjálvum og konuni Onnu, hevur hann ungdómsanda og góða heilsu.








# »So gott at vita« í tjaldinum

**Løg frá gospelfløguni »So gott at vita« verða framførd í tjaldinum á ólavsøku**

**Tíðindaskriv**

Tann 29. juli kl. 19.00 og kl. 21.30 verður konsert í tjaldinum í Kommunuskúlagarðinum við tí nýggju gospelfløguni »So gott at vita«.

Fløgan, sum er sera fjølbroytt í tónleikastíli, er til alla familjuna, og hetta tiltakið er ein frumførslukonsert.

Tónleikastílurin er alt frá pop til rap til dance, so har verður eitt sindur til hvønn aldursbólk. »So gott at vita« hevður 6 sangarar. Nógvir av sangunum eru longu nógv at hoyra í útvarpinum! Millum annað er sjálvt heiti á fløguni »So gott at vita« eitt lag, sum er nógv spælt, og fløgan er á topp 10 hjá 3´arinum.

Kostnaður fyri konsertina er einans 50,- og atgongumerki kunnu keypast í 3´aranum, og í tjaldinum í Kommunuskúlagarðinum ein hálvan tíma, áðrenn konsertin byrjar.

# ítróttur

Nr. 138 • hósdagur • 22. mai 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# KÍ tapti tepurt

**Kvinnurnar hjá KÍ taptu tepurt í fyrsta dystinum í bólkaspælinum í UEFA Women's Cup**

UEFA-CUP
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Veðurumstøðurnar til at spæla fótbólt vóru ikki av teimum bestu, sæð við føroyskum eygum, tá ið KÍ-kvinnurnar týsdagin leiktu fyrsta dystin í UEFA Women's Cup bólkaspælinum í Pólandi. Hitin var ikki minni enn 35 stig í skugganum, tá ið dysturin var brikslaður í gongd.

### KÍ tók leiðsluna

Í fyrra hálvleiki gekk leikur javnt á, men tað eydnaðist tó ikki hjá nøkrum av liðunum at fáa hol á. Eftir steðgin gekk betur, og tá ið fáir minuttir vóru leiktir av seinna hálvleiki, legði ein av royndastu leikarunum hjá KÍ, Rannvá B. Andreasen KÍ á odda, tá ið hon varð spæld leys á miðjum vølli. Hon dróg allan vegin fram móti málinum og sendi bóltin í meskarnar til 1-0.

Ukrainska mótstøðuliðið, Metallist Charkow, hevði annars havt bóltin meiri, og eftir føroysku leiðsluna roynd tær at leggja enn størri trýst á KÍ. Hetta gav eisini úrslit, tá ið eitt korter var eftir at leika, tí tá fekk ukrainska liðið javnað til 1-1. Og fyri at gera ilt verri, eydnaðist tað eisini Metallist Charkow at fáa sigursmálið, tá ið einans seks minuttir vóru eftir at leika. Hetta var eitt satt vónbrot fyri klaksvíkskvinnur, sum aftur í dag skulu í eldin. Hesaferð verður mótstøðuliðið lokalu favorittarnir úr AZS Wroclaw.



*Ein av royndastu leikarunum hjá KÍ, Rannvá B. Andreasen, legði KÍ á odda móti ukrainska Metallist Charkow, men móti endanum eydnaðist tað ukrainska liðnum at skora tvær ferðir, so at tær fóru avstað við øllum stigunum*

# Heri vann fótbóltsferðina

**Stóra EM tippikappingin er farin aftur um bak, og vinnari av kappingini gjørdist Heri Simonsen úr Havn**

EM-TIPPING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Nú er nakað síðani, at EM-endaspælið í Portugal fór aftur um bak, og harvið eisini stóra EM-tippingin, sum vit høvdu her í blaðnum. Undirtøkan hevur verið góð, og spenningurin hevur eisini verið stórur.

### Stóð á jøvnum

Tá ið avtornaði, vísti tað seg, at tveir navnframir mans, Heri Simonsen og John Petersen, vóru javnir á fremsta plássi við 19 røttum í part. Tí varð neyðugt við lutakasti fyri at fáa avgjørt, hvør av teimum báðum skuldi vinna stóru fótbóltsferðina. Tað lutakastið vann Heri, og tískil noyddist B36-liðskiparin at taka til takkar við einari ferð til dyst millum FC Keypmannahavn og Brøndby í Parkini, men tað er nú heldur ikki at kimsa at.

Á triðjaplássi var eisini javnt. Ikki færri enn sjey mans høvdu 17 rættar, og av tí at vinningar bert vóru til átta teir fremstu í kappingini, varð enn einaferð neyðugt við lutakasti. Triðjavinning vann enn ein B36-leikari, Bergur Midjord, og vinningurin hjá honum var ein Apex-ferðaseðil.

Tað hevur verið hugaligt hjá stigtakarunum til kappingina at síggja, hvussu nógv fólk hava víst kappingini áhuga, og ikki er óhugsandi, at kappingin verður endurtikin í sambandi við HM-endaspæli í Týsklandi um tvey ár.



*Heri Simonsen vann saman við John Petersen EM-tippingina og tí noyddist lutakast at vera um høvuðsvinningin. Heri vann lutakastið og kann tískil fara á fótbóltsferð í Europa*

# Tólv kapproðrar á ólavsøku

**Umframt teir seks FM róðrarnar og barnaróðrarnar verður skipað fyri fleiri eyka kappróðrum á ólavsøku**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*

Tað plagar at ganga skjótt og væl við kappróðrinum á ólavsøku, og tað er eingin orsøk at rokna við, at tað verður øðrvísi hesa ferð. Tað verður róð so at siga á deyðavatni, og rógvararnir eru allir í góðari venjing – eisini til at lurta eftir og taka til eftirtektar tað, sum startdómararnir og høvuðsdómararnir hava at siga. Hóast tað er tætt og stutt ímillum bátarnar, so eiga stýrimenninir nú eisini at vera í so mikið góðari venjing, at teir megna at halda tunguna mitt í munninum og bátin til tann geiran, sum teimum er tillutaður at rógva á.

Og eingin vandi er fyri, at fasti starturin ikki skal verða brúktur. Sum tað varð sagt í blaðnum í gjár, so hava teir í Havnar Róðrarfelag nú lagt fasta startin út undir Argjahøvda, har hann er festur inn á land. Tí verður tað líka mikið, um hann verður høgur ella lágur í ættini og um vindurin verður meiri ella minni ella tað kanska og vónandi verður stilli. Fasti starturin á Argjahøvda fer ongan veg.

Nú hevur Havnar Róðrarfelag boðað hinum róðrarfeløgunum frá, hvussu nógvir eykaróðrar fara at vera hesa ferð. Umframt teir seks FM róðrarnar og ivaleyst tveir barnaróðrar, sum Róðrarsambandið tekur sær av, so fer Havnar Róðrarfelag at skipa fyri fýra eykaróðrum.

Tað er ein ógvuliga gomul siðvenja, at gomul 6-mannafør rógva á ólavsøku. Falkurin úr Hósvík, Greivin av Signabø og Smiril úr Vági hava havt manga harða kapping á Havnarvág, og tað er aftur møguleiki fyri hesum í ár.

Tað hevur eisini nógvu tey seinastu árini verið vanligt, at old boys og old girls hava róð, og soleiðis verður tað eisini hesa ferð. Old boys róður verður við 8-mannaførum og 10-mannaførum, og old girls róður verður við 5-mannaførum. Havnar Róðrarfelag sigur, at tað skal boðast frá luttøku í old girls og old boys róðrunum og róðrinum millum gomul 6-mannafør í seinasta lagið sunnudagin 25. juli. Boðast kann frá á telefon 218484 ella 210050.

Havnar Róðrarfelag skipar fyri døgurðaborði í neystinum á middegi ólavsøkuaftan. Manningar, sum ætla at taka av hesum tilboðnum, skulu boða frá í seinasta lagið mánadagin 26. juli. Tær skulu boða frá á telefon 218484.

Nógv steyp eru, um tað ber til at siga tað soleiðis, í umfari í sambandi við kappróðurin á ólavsøku. Umframt ognarsteypini so skulu ferðasteypini handast eftir kappróðurin. Fyrsta treytin fyri at ferðasteypini kunnu handast er, at tey eru tøk. Tí er neyðugt, at tey, sum síðani á ólavsøku í fjør hava havt ferðasteyp í varðveitslu, sum tey ikki hava vunnið til ognar, syrgja fyri at lata tey innaftur. Hetta skal gerast í seinasta lagið týsdagin 27. juli, verður sagt í skrivi frá Havnar Róðrarfelag og til kappróðrarfeløgini.

# Endaliga støðan í EM-tippingini

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Heri Simonsen | 19 |
| 2. | John Petersen | 19 |
| 3. | Bergur Midjord | 17 |
| 4. | Dánjal M. Joensen | 17 |
| 5. | Róaldur Jacobsen | 17 |
| 6. | Kenneth Hovgaard | 17 |
| 7. | Jákup Eli Jacobsen | 17 |
| 8. | Símun Midjord | 17 |